Mikael Wiehe til Føroya

Kendi dansksvenski tónleikarin verður høvuðsnavn á konsert í sambandi við útgávu av føroyskari Afzelius-fløgu

TÓNLEIKAVITJAN
Eyðun Klakstein

Týsdagin 28. november verður føroysk fløga við sangum hjá svianum, Bjørn Afzelius, útgivin, og í tí sambandinum verður ein stór konsert í Norðurlandahúsinum.

Høvuðsnavnið á konsertini verður ein av teimum, sum stóð Afzelius nær bæði í tónleikaligum og privatum samanhangi. Talan er um Mikael Wiehe, sum spældi nógv saman við Afzelius bæði í sjeytiárunum og seinni.

Umframt Mikael Wiehe verða eisini nógvir føroyskir tónleikarar og sangarar við á konsertini.

Mangla ein sang

Føroyska Afzelius-fløgan er um at vera liðug.

10 sangir eru liðugt innspældir og eru ljóðblandaðir í Media Sound í Keypmannahavn. Í næstu viku verður tann seinasti sangurin á útgávuni innspældur.

Tónleikurin er fyri tað mesta upptikin í Studio Pegasus í Klaksvík, sum eisini gevur fløguna út, men upptøkur eru eisini gjørdar í Havn og í Keypmannahavn.

Fleiri enn 20 fólk

Erik Biskopstø hevur staðið fyri upptøkuarbeiðnum, og umframt hann spæla og syngja fólk sum Magnus Johannesen, Ronnie Nielsen, Sámal Ravnsfjall, Arnfríð Lutzen, Jóannes Jakobsen, Eyðun Nolsøe, Terji Rasmussen og Birgir Krossteig á fløguni.

Samanlagt eru fleiri enn 20 sangarar og tónleikarar við á fløguni, og nógv av hesum fólkunum verða eisini við á konsertini í Norðurlandahúsinum, har sangirnir av fløguni verða spældir fyri fyrstu ferð alment.

Eitt nýtt lag er við á fløguni. Tað er eitt tónleikapetti, sum Magnus Johannesen hevur gjørt sum intro til kanska mest kenda sangin hjá Afzelius í Føroyum, Sangur til frælsi.

Mikkael Wiehe verður at hoyra á konsert 28. november

Rentan hækkar

Í tíðindaskrivi boða føroysku peningastovnarnir í dag frá, at teir hækka rentuna. Tað er trýstið á donsku krónuna, sum hevur við sær broytingarnar, siga peningastovnarnir, sum kortini ikki gera somu broytingar

PENINGUR
Sveinur Tróndarson

Seinastu tíðina eru nógvar broytingar farnar fram á fíggjarmarknaðunum kring heimin og nú fær tað eisini ávirkan á føroyska peningamarknaðin. Í tíðindaskrivi boðar Føroya Banki frá, at teir hækka ávísar rentur, og í Sparikassanum vátta leiðslan, at teir eisini við rentubroytingum.

Í sínum tíðindaskrivi sigur Føroya Banki, at leiðslan hevur valt, at hækka ávísar rentusatsir, og tað merkir m. a. at rentan á bústaðarlánum við 1. veðrætti, vanligum konti og innlánum uttan uppsøgn ikki hækkar yvirhøvur.

Hinvegin hækka aðrar útlánsrentur við 0,5 prosentum, meðan rentan á eftirlønaruppsparing hækkar við 0,25 prosentum um árið.

- Rentan er bert 6,5 prosent, og samanborið við rentuna á peningamarknaðinum, sum í løtuni er góð 5,5 prosent, er hetta helst lægsta bústaðarrenta í Føroyum í longri tíð, sigur Jørn Arstrup Hansen, stjóri í Føroya Banka, í tíðindaskrivinum.

Henda avgerð bankans hevur tí eisini við sær, at ikki fleiri broytingar skulu gerast í gjøldunum hjá teimum, sum hava 1. veðrættarlán frá Føroya Banka.

Hóast tíðindaskrivið frá Sparikassanum ikki er almannakunngjørt í skrivandi løtu, so er nógv, sum bendir á, at hann ger tað sama. Í stuttari viðmerking sigur Marner Jacobsen, stjóri í Føroya Sparikassa, at tey eisini arbeiða við rentubroytingum og at hesar helst eisini vera almannakunngjørdar í dag.

Marner Jacobsen vildi ikki upplýsa hvørjar broytingar eru á veg, men tað er neyvan sannlíkt, at Sparikassin fer at lata vera við at hækka fyrsta veðrættarlánini, við teirri grundgeving, at størsti parturin av teirra útlánsmassa liggur í júst her.

Fyri kundarnar ger tað kanska ikki so nógv, tí so er kapping um kundarnar við rentuni, sum vápn.

Sjúkrahúsið í Esbjerg bakkar:

Sálarfrøðingur harmast orðing

Leiðandi sálarfrøðingurin á Amtssjúkrahúsinum í Esbjerg heldur, at hann er komin við vánaligari grundgeving fyri at nokta misnýttari føroyskari kvinnu sálarliga hjálp


Grænseoverskridende adfærd synes at være temmelig almindeligt forekommende i dele af den færøske kultur, og der viser seg i behandlingsforløbet ofte vanskeligheder med kulturforskelle mellem patient og psykolog.

Kynslig misnýtsla
Eyðun Klakstein

Amtssjúkrahúsið í Esbjerg hevur hug at draga í land, eftir at Sosialurin hevur fingið hendur á einum skrivi, sum sjúkrahúsið fyri trimum vikum síðani sendi føroyskari kvinnu.

Í hesum brævi noktar psykologdeildin á sjúkrahúsinum at veita kvinnuni, sum í næstan 10 ár varð misnýtt av pápa sínum, sálarfrøðisliga hjálp, hóast læknin hjá henni helt, at hon átti tørv á slíkari hjálp.

Grundgevingin hjá Amtssjúkrahúsinum fyri at siga nei til føroysku kvinnuna kom óvart bæði á kvinnuna og danska lækna hennara, og nú Sosialurin hevur avdúkað innihaldið í brævinum, hevur leiðandi sálarfrøðingurin hug at draga í land.

- Kanska kann eg teska til tín, at eg átti helst ikki at havt orða meg soleiðis, sigur Ib Svennild, leiðandi sálarfrøðingur á Amtssjúkrahúsinum í Esbjerg.

Óvanlig orðing

Í summar flutti tann 24 ára gamla kvinnan av Skála til Esbjerg, eftir at hon hevði tikið uppgerðina við pápa sín, sum hevði misnýtt hana frá tí at hon var seks ára gomul, til hon var 15 ár.

Í Esbjerg royndi hon at fáa sálarfrøðisliga hjálp, og læknin hjá henni sendi psykologdeildini hjá Amtssjúkrahúsinum í Esbjerg eitt skriv, har hann greiddi frá, at føroyska kvinna hevði hjálp fyri neyðini.

Men sjúkrahúsið í Esbjerg kveistraði kvinnuna burtur.

- Grænseoverskridende adfærd synes at være temmelig almindeligt forekommende i dele af den færøske kultur, og der viser seg i behandlingsforløbet ofte vanskeligheder med kulturforskelle mellem patient og psykolog, skrivar psykologdeildin á Amtssjúkrahúsinum millum annað í brævinum til føroysku kvinnuna og lækna hennara.

- Eg gjørdist sera ill, tá eg fekk hetta brævið, tí fyri mær er hetta ein fullkomiliga órímilig grundgeving fyri ikki at geva mær hjálp. Læknin segði seg ikki hava sæð slík bræv áður, greiðir 24 ára gamla kvinnan frá.

Hevði orðað seg øðrvísi

Leiðandi sálarfrøðingurin á sjúkrahúsinum heldur, at orðingin í brævinum kann tykjast óheppin.

- Vit klára ikki at taka at taka allar sjúklingarnar, sum verða vístir til okkara, og ístaðin fyri bara at siga nei, royndi eg at geva kvinnuni eina grundgeving fyri, hví vit ikki kundu veita henni hjálp, sigur Ib Svennild við Sosialin.

- Um eg skuldi skriva brævið umaftur í dag, hevði eg helst valt at orða meg øðrvísi, tí eg dugi at síggja, at handan orðingin kann tykist rættiliga óheppin, um hon stendur einsamøll, sigur danski sálarfrøðingurin.

Ger ikki mun á

Á psykologdeildini á Amtssjúkrahúsinum arbeiða tríggir sálarfrøðingar, og sambært Ib Svennild verða tvífalt so nógvir sjúklingar vístir til sjúkrahúsið, sum tey klára at viðgera.

- Tí verða vit noydd at velja og vraka, hóast tað kann tykjast rættiliga kensluleyst við hvørt. Í hesum førði skal tað viga mest, at vit ikki hava mett okkum at hava orku til at viðgera føroysku kvinnuna, sigur Ib Svennild.

- Hetta skal ikki skiljast sum, at vit ikki kunnu veita føroyingum sum heild hjálp, tí vit viðgera eisini føroyingar, men í hesum førði kendu vit okkum noydd at siga nei, soleiðis sum vit gera við so nógv onnur fólk.

Hann leggur dent á, at psykologdeildin ikki ger mun á føroyingum og donum, tá tað verður mett um, hvør skal fáa viðger á sjúkrahúsinum, hóast orðingin í brævinum gevur ábendingar um hetta.

Grundgevingin hjá Amtssjúkrahúsinum fyri at siga nei til føroysku kvinnuna kom óvart bæði á kvinnuna og dansk lækna hennara, og nú Sosialurin hevur avdúkað innihaldið í brævinum, hevur leiðandi sálarfrøðingurin hug at draga í land

Listin hjá Fólkaflokkinum í Klaksvík

Klaksvík: Nú er greitt, hvørji fólkini á listanum hjá Fólkaflokkinum verða til býráðsvalið í november.

Allir fýra býráðslimirnir hjá flokkinum stilla uppaftur, og afturat teimum eru bæði fólk, sum áður hava verið uppstillað, og okkurt nýtt andlit.

Valevnini eru Erik Andreasen, Helena Gudjónsson, Elsebeth Gunnleygsdóttur Hansen, Petur Hans á Høvdanum, Karl Birgir Isaksen, Thomas Jacobsen, Jógvan við Keldu, Pauli Klakstein, Jógvan Lützen og Kristian Fríðrik Olsen.

Erik Andreasen, Jógvan við Keldu, Jógvan Lützen og Kristian Fríðrik Olsen hava umboðað Fólkaflokkin í býráðnum farnu fýra árini.

ek

Kunnu velja borgarstjóra í Klaksvík

Fleiri hundrað fólk hava longu atkvøtt á Internet-Sosialinum, har tað nú ber til at at velja borgarstjóra í Klaksvík

Á heimasíðuni hjá Internet-Sosialinum ber nú til hjá fólki at siga, hvønn tey helst vilja hava sum borgarstjóra í Klaksvík.

Borgarstjórin verður ikki beinleiðis valdur á valinum í november, men á Internet-Sosialinum hava fólk nú møguleikan at siga sína hugsan.

Undan hesum valinum hava nógv fólk luttikið í valinum at velja borgarstjóra í Havn, men tann atkvøðugreiðslan er nú liðug.

Torleif fremst

Fimm fólk eru skotin upp sum borgarstjóri í Klaksvík, og tey umboða hvør sín flokk. Verandi borgarstjóri, Jógvan við Keldu, er ein teirra, og síðani eru evnini Betta Joensen, Torleif Sigurdsson, Karl Heri Joensen, Karsten Hansen og Hilmar Danielsen.

Tey knapt 400 fólkini, sum høvdu greitt atkvøðu, tá hendan greinin var skrivað fyrrapartin í gjár, hava serligan tokka til Torleif Sigurðsson, Jógvan við Keldu og Karsten Hansen, sum eisini verða mettir sum tríggir teir fremstu kandidatarnar til borgarstjórasessin.

Atkvøðugreiðslan heldur fram komandi vikuna.

ek